**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Tíðaravmarkað starv sum deildarstjóri til Almanna- og heilsumálastýrið vegna barnsburðarfarloyvi.

**Eitt starv sum avloysara fyri deildarstjóra í Almanna- og heilsumálastýrinum, við tænastu á Heilsudeildini, verður við hesum lýst leyst til setan frá 1. apríl 2002 ella eftir nærri avtalu og til 31. desember 2002.**

**Talan er um nýggja deild, sett á stovn í november 2001, sum verandi deildarstjóri saman við starvsfólkunum er í fer við at byggja upp.**

**Á deildini starvast í løtuni umframt deildarstjóran og skrivara, 5 fulltrúar, sum allir hava akademiska útbúgving.**

**Høvuðsuppgávur:**
- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini.
- Ábyrgd av løgfrøðisliga og fíggjarliga arbeiðnum innan økið.
- Ábyrgd av viðgerð av kærum, sum ikki eru lagdar til kærustovn.
- Veita ráðgeving til stovnarnar innan økið
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**
- Útbúgving frá hægri lærustovni
- Leiðsluroyndir, nútíðar leiðslueginleikar.
- Kunnleika til heilsuøki.
- Kunnleika til arbeiði við fíggjarlóg
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk.
- Góð samstarvsevni.
- Vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn og setanartreytir:**
Tann setti hevur tilvísing til aðalstjóran, og er á linju við hinar deildarstjórarnar í aðalstýrinum.

Setanarøki er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Søkir tænastumaður starvið, kann setanin vera sum tænstumaður.

Starvið er flokkað í 37. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Verður starvið sáttmálasett, verða goldin 15% í eftirlønargjaldi.

**Umsóknir**:
Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 4. mars 2002 kl. 12⁰⁰.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra tlf. 304045 ella Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

# Goymslufólk til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum goymslufólk leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Starvið fevnir m.a. um:**
- avgreiðslu
- skipan av goymslu
- goymslustýring
- smávegis umvælingar av hjálpartólum

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- drúgvar royndir frá líknandi arbeiði
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 5. mars 2002 kl. 14⁰⁰.

# Bilur til sølu

**Merki:** Saab 900 i, 5 hurðar
**Árg.:** 30/08-1996
**KM.:** 52.140

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

John Ellefsen
e-mail: je@trygging.fo
tlf. 345727 – fartlf. 288592
fax 345607
at hitta mánadag til hósdag millum kl. 8³⁰–10⁰⁰ og fríggjadag millum 8³⁰–16⁰⁰.

**Søkt verður eftir**

# LÆRLINGI

**at byrja sum skjótast**

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

**Vit vænta,** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002.

P/F Hjá Fróða
**Yviri við Strond 3 • tel 310808 • fax 314676**

# Pedagogur søkist

Vegna barnsferð verður søkt eftir pedagogi til Sambýlini Á Mýrini 4-6 til setan 1. apríl 2002 ella eftir nærri avtalu Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Sambýlini Á Mýrini eru heim hjá 10 menningartarnaðum fólkum, sum krevja hjálp og vegleiðing í tí dagliga.

Nærri fæst at vita við at venda sær til fyristøðufólkið ella varðafyristøðufólkið á tlf. 311478 ella 319958.

Umsóknarfreistin er 1. mars 2002.

Umsóknir skulu sendast til:

**Sambýlini Á Mýrini**
Att: Fyristøðufólkið
Á Mýrini 4-6

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Vikuskifti

Nr. 33 • leygardagur • 16. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo



Søkti maður mín føroyskt fiskiskip?

Á slóðini hjá Wilfried Prellberg, týskum kavbátaskipara undir 2. veraldarbardaga

Lesið síðu 6 og 7



*– Tað var ikki fyrr enn eg varð pensjoneraður, at eg byrjaði at koma regluliga í Undirhúsið, og tað eru nú 16 ár síðani, sigur pensjóneraði landsdjóralæknin, Dánjal Jákup Bærentsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hugni í Undirhúsinum

Í umleið ein mansaldur hevur Undirhúsið í Vágbotni í Havn verið staðið, har eldri menn hava hildið til. Undirhúsið er framvegis virkið og einir 40 mans plaga at stytta sær stundir í kjallarahølinum í Vágsbotni

PRÁT
*Ingrid Bjarnastein*

Sólin hevur hug at kaga fram, tá Sosialurin ein seinnapart í vikuni vitjar í Undirhúsinum. Tíðliga er um seinnapartin, so tað stóra av fólki er ikki at síggja í Undirhúsinum. Ein maður gongur og putlast við okkurt, hyggur útum, vitar hvat gongur fyri seg úti á kajini. Við tað eina borðið situr ein maður. Tað er ongin mætari enn Dánjal Jákup Bærentsen, gamli landsdjóralæknin. Vit sessast og spyrja, um pensjoneraði landsdjóralæknin hevur hug at fortelja okkum eitt sindur um Undirhúsið.

– Sum eg kann minnast, so byrjaði Undirhúsið við tí, at tað vóru ymsir menn, Jóhan Shell, Zacharias á Argjaboða og aðrir, ið plagdu at hittast við bensinpumpuna, sum stóð á kajini. Fleiri og fleiri eldri menn, byrjaðu so koma saman her ella í Gamla Undirhúsinum, sum er beint við síðuna av, greiðir Dánjal Jákup Bærentsen frá.

Talið øktist, og fleiri og fleiri byrjaðu at hittast at tosa um, hvat rørdist í samfelagnum, hvat gekk fyri seg í býnum og annað.

Dánjal Jákup heldur, at navnið "Undirhúsið" kemur frá tí, at Poul Hansen hevði heilsølu í Vágsbotni. Gomlu menninir vóru í kjallaranum, og skrivstovurnar hjá Poul Hansen í ovaru hæddini. Ovara hæddin varð til Yvirhúsið og kjallarin varð tí til Undirhúsið.

## Selja agn

Sum vit sita og práta koma nakrir menn inn afturat. Teir sessast og práta eitt sindur uppi í viðhvørt, men tað er ongin, sum rættiliga vil blanda seg uppí prátið.

– Vit selja eisini agn her, fortelur gamli landsdjóralæknin víðari. –

– Tað koma so nógvir bátar inn her, sum skulu út á fjørðin, so her kunnu teir keypa agn. Vit hava makrel, goggur og eisini rækjur. Peningin, vit fáa burturúr hesum, fíggjar útreiðslurnar Undirhúsið hevur, og ei ferð um árið verður ein útferð gjørd.

Undirhúsið hevur verið í Gásadali, úti í Fugloy, í Oyndarfirði, á Eiði og í summar gongur leiðin helst út í Mykines, men hetta er ikki heilt avgjørt enn. Eisini verður peningurin nýttur til blómutyssi, tá onkur hevur føðingardag, ella ein vakran krans, tá onkur hevur sett trætufflurnar.

– Eg havi gingið her í umleið 20 ár, sigur Dánjal Jákup.

– Tað var ikki fyrr enn eg varð pensjoneraður, at eg byrjaði at koma her regluliga, og tað eru nú 16 ár síðani. Var eg ein av teimum yngstu tá, man eg teljast millum teir elstu nú. Einasta broytingin, ið fer fram er, at tað minkar í eldra endanum, og veksur í hinum.

Í Undirhúsinum verður prátað um alt millum himmal og jørð, og tá ikki meira er at práta um, verður kortspælið tikið fram. Grev jass, sjavs og vist eru spølini, teir gomlu plaga at sita og spæla.

Útsenda frá Sosialinum og myndamaður takka fyri prátið, og teir fýra, ið nú hava funnið leiðina oman í Vágsbotn, taka kortini fram. "Jamen, so meldi eg grand", eru síðstu orðini, áðrenn hurðin inn í Undirhúsið verður latin aftur.